## DAGSINS MEINING

# Skjøtil settur á

Hóast myrk skíggj hómast glottar í búskapinum. Eftir at øll vón var slept á fáa alivinnuna á føtur aftur, eru nú tekin til, at vinnan so smátt er farin at fóta sær aftur. Men hetta er ikki nakað, sum kemur av sær sjálvum. Hækkandi prísir eru sjálvandi grundarlagið undir øllum, men tað er ikki nóg mikið. Ein fortreyt er eisini, at føroyingar eins og útlendingar aftur fara at trúgva uppá hesa vinnu og harvið vilja váða kapital at menna hana aftur.

Aðrir glottar eru eisini. Og her hugsa vit um eina møguliga komandi oljuvinnu. Eftir at hava fyrireikað okkum, gjørt kanningar av ymsum slag og eisini borað nakrar brunnar, eru nú tekin til eina bæði spennandi og helst eisini bjarta tilgongd. Í hvussu er um vit skulu ganga eftir útsøgnunum frá oljufeløgum, sum so aftur hava støði í teimum fundum, sum eru gjørd á Atlantsmótinum.

Her er seinasta stóra oljufundið við markið, gott nokk á bretskum øki, Rosebank/Lochnagar, katalysatorurin fyri bjartskygninum. Tað góða er tann sannroynd, at her er talan um eitt ítøkiligt oljufund, sum liggur beint upp at okkara marki. Eitt fund, sum vit hava nógv at takka fyri, tí helst varð tað hetta fundið, ið var orsøkin til, at 2. útbjóðing var væleydnað. Tað er ikki ov nógv sagt, at tað var í tøkum tíma, at hetta fundið varð gjørt. Varð hetta serstaka fundið ikki gjørt júst tá er sera ivasamt, um nakað nýtt lív var komið í oljutilgongdina – annað enn tað feløgini hava bundið seg at bora í 1. útbjóðing.

Hví skal ein fund í bretskum øki tá hava so stóran týdning fyri leiting við Føroyar kundi verið spurt. Svarið er, at hetta liggur so tætt upp at markinum, og at tað er gjørt í jarðløgum av sama slag, sum finnast okkaru megin markið. Og so tann sannroynd, at oljufeløgini, sum eru við í leitingini kring markið, eru stór feløg, sum trúgva uppá framtíðar fund í okkara øki tvs. Chevron, Statoil, Shell fyri bert at nevna nøkur.

Aftur kundi verið spurt, hví vit skulu hava størri vónir nú, tá somu vónir eisini vóru til steðar, tá farið varð at bora í "Gullhorninum" á sinni – og har júst somu grundgevingar vórðu fyri bjartskygninum, nevniliga at stór fund vórðu gjørd hinumegin markið. Svarið kann tykjast torført, men her mugu vit so bara halda okkum til tað, sum jarðfrøðingarnir siga, at nú er man farin eftir nøkrum øðrum "plays" og jarðløgum, tvs. arbeiðshættirnir og strukturarnir í undirgrundini eru øðrvísi enn tað, sum varð farið eftir í Gullhorninum.

Statoil leggur hart út í summar. Ger seismiskar og aðrar kanningar við trimum skipum. Chevron er við at gera klárt til eina stóra kanning eisini. Haraftrat koma eisini onnur feløg við sínum kanningum. Hetta er grundarlagið undir fleiri brunnum, sum verða boraðir í 2006 og 07 á okkara landgrunni og beint hinumegin markið. Tað góða í øllum hesum er, at leitingin báðumegin markið kann supplera hvørt økið sær. Tvs. at úrslit øðrumegin markið kunnu gagna leiting hinumegin. Og síggja vit longur fram, so kann henda, at fund, sum verða gjørd báðumegin markið, í eini framtíðar útbygging, kunnu brúka sama undirstøðukervið, tvs. at fundini harvið ikki nýtast at vera so øgiliga stór fyri at kunna vera kommersiell. Hetta er eitt av góðu kortunum, sum nú liggja á borðinum og sum geva bjartskygninum innihald. Tí eiga vit at síggja hetta sum leiting á Atlantsmótinum heldur enn bara við Føroyar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Framtíðin og pensjónin

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*

*Spurningurin um pensjónirnar í framtíðini eigur at verða viðgjørdur bæði væl og virðiliga, og hóast arbeiðsbólkar hava verið settir, og spurningurin av og á hevur verið havdur á lofti, so er ongin greið støða enn.*

Semja var í sitandi samgongu at styrkja arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í sambandi við broyttu skattalógina, og væl var tað! Eftir liggja tó aðrir spurningar at loysa, har vit fullkomiliga eru eftirbátar, tá vit sammeta okkum við okkara grannalond.. At adoptera aðrar loysnir uttan fyrilit, eiga vit sjálvandi ikki, men tað er ein fyrimunur fyrst at síggja og hoyra, hvørjar royndir onnur hava gjørt. Eisini skal sigast, at t.d. heitini "eftirløn" og "pensjón" hava ikki sama týdning, tá talan er um donsk viðurskifti.



### Fólkapenjónin

Tá fólk (eisini olitikarar) tosa um "eldrabyrðuna", so er tað eitt mannminkandi ummæli, ið tey eldru í dag ikki hava uppiborið. Hvør annar enn júst tey hava lagt lunnar undir samfelagið í dag, og eru tað ikki júst tey, sum hava verið við til at fíggja tær útbúgvingar, ið "tey lærdu" í dag hava fingið?

Óneyðugt skuldi verið hjá mær sum sambandsfólk harumframt at mint á, hvør annar hevur verið við til at goldið, men lat tað liggja hesuferð!

Tá talan er um fólkapensjónina, so er veruleikin tann, at færri og færri verða at gjalda fyri fleiri og fleiri pensjonistar, tí meðallivitíðin hækkar, og tað er ongin nýggjheit, men hvat gera vit so?

Hetta er ein avbjóðing til okkum politikarar!

Fólkapensjónsskipanin verður eisini kallað **ein óskrivaður sáttmáli millum ættarliðini**, og hesin sáttmáli inniber, at tú sum vinnuvirkin rindar skatt til m.a.fólkapensjón til ættarliðið frammanundan tær í tí trúgv, at næsta ættarlið rindar skatt til tína fólkapensjón. Men nú er so nógv broytt, so ivi er, um hesin sonevndi sáttmáli kann haldast.

### Aldursmarkið?

Eftir míni hugsan skulu vit burtur frá tí hugsan, at tú er gamal, tá tú er 67.

Lógin um fólkapensjón sigur, at tú hoyrir til pensjonistabólkin, tá tú er 67 ár.

Vanligur praksis er, at tá skal tú burtur av almenna arbeiðsmarknaðinum. Er tað so rættvíst? Tann sum er 60 í dag er (um heilsan loyvir tí sjálvandi) líka væl fyri sum ein, ið var 50 fyri 20-30 árum síðan.

Fleiri av teim, ið gerast 67, kenna seg vorðnan eina byrðu fyri samfelagið móti sínum egna vilja, og betri gerst tað ikki, tá politikarar minna tey á tað!

At vit fingu fólkapensjónsskipanina var eitt stórt frambrot fyri vælferðina, og tað fegnast vit um, tí nógv eru tey, sum eru troytt og gleða seg til fólkapensjónina, sum tey hava arbeitt fyri og uppiborið at fáa, meðan tað í dag eisini eru nógv, sum hugsa júst hitt øvugta, og vildu fegin sloppið at hildið fram eina tíð enn.

Hesa avbjóðing eiga vit sum politikarar at taka í álvara, við t.d. at virka fyri einum fleksiblum pensjónsaldri í framtíðini, har tey ið vilja tað, og tey ið ikki orka, skulu varðveita verandi skipan, meðan onnur kunnu sleppa at halda fram á arbeiðsmarknaðinum nøkur ár aftrat.

# Hægri lesnaður útbúgving

**Hans Birgir Hansen**

Nú má ruddast upp í stuðulskipanum, ið Mentamálaráði og Stuðulstovnur, hava um hendi, vit skula avmarka í stuðulskipanir, lestrarstuðul, teirra í lesa uttanlands.

Vit eiga at finna út av hvønn tørv á útbúgvnum føroyingum vit hava á øllum økjum, tá hugsa verður um heildarskipanina/støðuna/tørvin/tá fólk leggja frá sær. Tillaga vit ikki hægri lestna útbúgving, eftir tørvinum á fakligari arbeiðsmegi, fáa vit trupulleikar, tey komandi nógvu árini, í kan fáa alt tað fakliga at steðga upp.

Vit hava hópin av fakligari arbeiðsmegi í eru arbeiðsleys undir ALS & Almannastovuskipanum hví sleppa hesi ikki út aftur á arbeiðsmarknaðirnar ídag? Hvussi stórt tal av útbúgvnum føroyingum heima og uttanlands hava ikki seinastu nógv árini fingið hægri lestna, útbúgving, ið ikki gera nýtslu av slíkari ídag?

Vit kunna ikki framhaldandi fíggja, lestrarstuðul, lesandi uttanlands í fáa hægri lestna, útbúgving, í ikki leita heim aftur, í arbeiða/starva/uttanlands ídag.

Tað er avgerðandi neyðugt, fáa byrja uppruddingararbeiði og fáa útbúgvna fólki at taka við tá fólk leggja frá sær á arbeiðsmarknaðum vegna aldurin ídag.

Tað kan ikki vera rættvíst at bíliga arbeiðsmegin óheft av arbeiðara og fakfeløgum skal leggja teim fótin fyri at sleppa út aftur á arbeiðsmarknaðirnar ídag.

Hetta eiga embætisfólkini og politikarar og onnur í politisku størvunum at kunna gera sær nógv greitt í tí riknað starvsfólkapolitikinum, í aðalráðunum ídag.

Og hvat við øllum teim sum luttaka á dag og kvøldskeiðum, hvørjar møguleikar, hava tey at sleppa út á arbeiðsmarknaðirnar, og vinna til lívsins uppihald.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.